


# "Um eg kundi kvøðið..." • Stanley í Sólorku

Vit fegnast stórliga um, at tónaskaldið, tónleikarin og sangarin Stanley Samuelsen kemur at vitja vársetu okkara. Stanley er musikalskur úrmælingur, og føroyingar kenna mong av hansara vøkru løgum, eitt nú 'Um eg kundi kvøðið' og 'Tá eg verði gamal'.

Við sínum góðu gávum og professionella hugburði hevur Stanley sungið og spælt kring Europa og enntá eisini í USA. Í vár sleppa gestir okkara at uppliva hann bæði til hugnaløturnar á Vaglinum og í dansinum í Klubbanum.

Á Vaglinum fara vit at práta við Stanley um lív hansara – um barndómin og ungdómsárini í Fuglafirði og um lív hansara úti í stóru verð, síðani hann fyri 54 árum síðani flutti til Danmarkar sum 19 ára gamal.

Vit fara eisini at tríva í eitt serligt tema í samsvari við endamál okkara um 'góðalívið uttan mørk'. Stanley er raktur av Alzheimer's sjúku, og vit fara at skifta orð um hetta við hann og Merete, konu og lívsfelaga hansara.